# UR AFRIKA



# Týska hevndin

**HM2010** Ikki bara fekk Týskland hevnd fyri ivasama HM-finalumálið hjá Onglandi í 1966, tí veruleikin var, at Týskland sópaði Ongland av vøllinum í áttandapartsfinaluni í gjár




*Skotið frá Frank Lampard var hálvan metur innan fyri málstrikuna, men málið varð ikki viðurkent, so Ongland kom upp á 2-2 ímóti Týsklandi, sum í staðin vann 4-1. Ein støða, ið minnir um 1966, og sum helst verður minst líka nógv umrødd í komandi árum*

Mynd: AP

**Hilmar Jan Hansen**

Kjak um støður í einum fótbóltsdysti er ein náttúrligur partur av fótbóltsspælinum, og í gjár kom so aftur ein av støðunum, ið fer at verða eitt heitt evni í mong ár fram í tíðina. Tá Frank Lampard lobbaði bóltin í mál seint í fyrra hálvleiki, var einki ivamál um, at bólturin var væl og virðiliga inni í málinum, men hvørki dómari ella linjudómari sóu tað soleiðis, og tí var ikki mál.

Hevði Ongland fingið hetta málið viðurkent, var støðan 2-2 í risadystinum, og tey ídnastu viðhaldsfólkini kjakast í dag um, hvussu hetta »uttan iva« og »heilt avgjørt« hevði vent dystinum. Tað gjørdi tað ikki, og tvørturímóti yvirskuggaði týski innsatsurin fullkomuliga enska máttloysi og troti á hugflogið, og tí munnu tey fægstu innast inni ivast í, at dysturin fekk rætta vinnaran.

Enska »málið« var úrslit av einari lítlari løtu í tí langa dystinum, har Ongland slapp eitt sindur upp í part, men líka so væl sum hasin vælsignaði bólturin var úti, var Ongland uttan nakran sum helst iva úti. Ei undur í, at enska pressan húðflettir vánaliga enska innsatsin í HM-endaspælinum, tí avrikini hava veruliga ikki verið nakað at reypað av. Og so slett ikki í gjár!

Gamaní, hevði sami Lampard eitt gott skot, yvirliggjarin var raktur, Steven Gerrard kom væl ígjøgnum úti í síðuni viðhvørt, og Wayne Rooney vísti ímóti endanum onkrar snildir, ið vístu, hvat hann kanska kundi fingið at riggað í kappingini, hevði hann veruliga verið í formi. Men tað broytir hvørki úrslitið ella veruleikan.

## Løntu 1966 aftur

– Endiliga fingu vit lønt aftur tað, sum hendi á Wembley í 1966, segði tvífaldi týski málskjúttin, Thomas Müller, eftir sigurin á Onglandi. Sjálvur er hann føddur 23 ár eftir HM-finaluna í 1966, men sum allir aðrir týskarar, hevur hann livað við søguni um Wembley-málið, ið Ongland fekk viðurkent, hóast bólturin kanska ikki var innanfyri.

Ongar myndir hava enn staðfest, um tað veruliga var mál ella ikki, men sveisiski dómarin dømdi mál, tá Geoff Hurst sendi bóltin á yvirliggjaran, so hann stakk niður í vøllin og útaftur í spæl. Hesa ferð var hinvegin eingin ivi um, at bólturin var inni, men málið bleiv ikki dømt.

Kjakið um ódømda málið í gjár kann skjótt snúgva seg um, um Ongland skuldi sloppið at hildið fram í HM-endaspælinum ella ikki, men spurningurin um dómin er á eitt sindur hægri stigi enn so, tí skuldu eitt nú myndatól, fotosellur ella annað gjørt av, um bólturin var innanfyri, hevði talan ikki longur verið um fótbólt, sum vit í dag kenna spælið.

## Størsta sjarman

Tað, sum hendi í gjár, var eitt dømi um eitt sjáldsama grovt mistak í einum týðandi dysti, men hetta var ikki fyrstu ferð og heldur ikki síðstu ferð. Og einki røkist fyri, at fótbóltsheimurin sleppur undan hesum møguleikanum, at menniskjanslig mistøk kunnu kosta eitt sindur her og eitt sindur har.

Fleiri vilja nú hava myndatól og alla hugsandi tøkni at hjálpa dómarunum, men hesum hevur FIFA ikki áhuga fyri, tí tað vildi gjørt, at fótbóltsspælið ikki longur er tað einfalda spælið, sum tað ber til at spæla allastaðni kring knøttin. So leingi ábyrgdin av dømingini liggur hjá dómaranum og hansara tveimum linjudómarum, er tað so einfalt, sum tað ber til, og helst er tað eisini frægast soleiðis.

Júst tað, at øll kunnu kjakast og trætast um støður í einum dysti, er ein stórur partur av tí sosiala týdningi, fótbólturin hevur. Og tá kann tað altso gera tað sama, um tað eru Týskland og Ongland, sum hava spælt, ella um talan er um ein venjingardyst millum Undrið og Giza. Tað er kanska ein hin størsta sjarman av øllum við fótbóltinum…

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## FAKTA UM DYSTIRNAR

**Týskland - Ongland** 4-1 (2-1)
1-0: Miroslav Klose, 20.
2-0: Lukas Podolski, 32.
2-1: Matthew Upson, 37.
3-1: Thomas Müller, 67.
4-1: Thomas Müller, 70.

**Argentina - Mexiko** 3-1 (2-0)
1-0: Carlos Tevez, 26.
2-0: Gonzalo Higuain, 33.
3-0: Carlos Tevez, 52.
3-1: Javier Hernandez, 71.

**USA-Ghana** 1-2 *eftir umdyst (0-1, 1-1)*
0-1: Kevin-Prince Boateng, 5.
1-1: Landon Donovan, 62. (br.)
1-2: Asamoah Gyan, 93.

**Uruguay - Suðurkorea** 2-1 (1-0)
1-0: Luis Suárez, 8.
1-1: Lee Chung-yong, 68.
2-1: Suárez, 80.

***Dystir í dag:***
***Holland-Slovakia, kl. 15.00***
***Brasil-Chile, kl. 19.30***